# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit fara úr stjórnini. Eingin kann sita í einari stjórn, ið hóreiggjar sær sum hendan*

*polski varaforsætisráðharrin, Andrej Lepper*

# Stór turkisk herleið við irakska markið

**Turkaland hevur savnað 140.000 hermenn fram við irakska markinum, og herurin ætlar sær um markið**




*Turkiski herurin vil sleppa inn um irakska markið eftir kurdiskum uppreistrarmonnum*

Turkiski uttanríkisráðharrin, Hoshiyar Zehari, viðgongur fyri Reuters, at turkiski herurin hevur savnað herfólk fram við irakska markinum, og at talan er um eitt stórt átak.

Meiri vil hann ikki siga, men trygdartænastur siga, at talan er um einar 140.000 hermenn, og at teir eru útgjørdir við øllum nútímans vápnum.

Turkiski herurin hevur leingi verið í stríði við kurdiskar uppreistrarmenn har eysturi í landinum, og turkisku myndugleikarnir siga, at uppreistrarmenninir fjala seg í Irak og fremja álop um markið. Nú hevur herleiðslan biðið politisku myndugleikarnar í Ankara um loyvi at senda hermenn um markið eftir teimum kurdisku uppreistrarmonnunum. Eygleiðarar siga, at verða turkisk herlið send inn um irakska markið, kann tað fáa álvarssamar avleiðingar.

# Jafar bleiv steinaður til deyða

**Iransku myndugleikarnir viðganga, at ein maður bleiv steinaður til deyða í síðstu viku**

Jafar Keyiani og Mokarrameh Ebrahim vórðu tikin fyri ellivu árum síðani, tí tey høvdu fingið eitt barn uttan fyri hjúnarlag, og sambært iranskari lóg kundi revsingin vera, at tey skuldu steinast til deyða. Tað hendi tó ikki, og fyri fimm árum síðani gav ovasti dómarin í Iran, Ayatolla Mahmoud Hashemi-Shahrudi, boð um, at steiningin var sett úr gildi sum revsing.

Men í síðsta mánað frættist, at myndugleikarnir høvdu gjørt av at steina Jafar Keyiani til deyða fyri tað ellivu ára gamla lógarbrotið. Steiningin varð tó av ongum tá, tí fleiri lond mótmæltu, men í dag váttaði ein talsmaður hjá løgmálaráðnum í Teheran, at Jaafar Keyiani bleiv steinaður til deyða í bygdini Aghche Kamd seinasta hósdag.

Mokarrameh Ebrahim, sum nú er 43 ára gomul, situr framvegis í fongsli. Sambært lógini kann hon eisini steinast til deyða.

# Herseting endaði við blóðbaði



*Eftir skotbardagar í fleiri dagar ímillum herin og islamistiskar uppreistrarmenn herjaði pakistanski herurin á Ta Reyðu Moskuna í Islamabad tíðliga í morgun. Álopið endaði í einum blóðbaði, og minst átta hermenn og umleið 50 uppreistrarmenn lógu eftirá.*

## STUTT SAGT

### Steðga fiskiskapi

ES-myndugleikarnir hava givið polskum trolarum boð um at gevast við at royna eftir toski har eysturi í Eystrasalti. Orsøkin er, at veiðitølini, sum póllendingar hava givið upp, samsvara als ikki við veruleikan. Niðurstøðan hjá ES-myndugleikunum er, at polsku trolararnir hava longu fiskað alla toskakvotuna í ár, og tí skal fiskiskapurin steðga beinanvegin. ES hevur samstundis varskógvað Svøríki og Litava um, at tey eiga ikki at veiða meiri tosk í ár.

### Fleiri flúgva

Ferðafólkatalið á flogvøllinum í Keflavík í Íslandi var sjey prosent størri í juni í ár enn í sama mánað í fjør. 257.000 fólk ferðaðust um vøllin í síðsta mánað ímóti 240.000 í juni í fjør. Nógv tann størsti parturin eru ferðafólk við flogførum, sum millumlenda í Keflavík á veg tvørtur um Atlantshavið, og hesi vóru átta prosent fleiri í síðsta mánað enn í juni í 2006. Tey, sum komu til Íslands ella fóru haðani, vóru sjey prosent fleiri enn í fjør.

### Dýrari bensin

Í Svøríki umhugsar stjórnin at leggja eitt avgjald á bensin fyri at fáa fólk at brúka bilin minni og á tann hátt hjálpa umhvørvinum undan dálking. Verður ætlanin sett í verk, fer ein litur av bensini at kosta 16,25 danskar krónur. Í løtuni kostar hann 9,74 danskar krónur. Anders Calgren, umhvørvismálaráðharri, hevur hug at seta tiltakið í verk sum skjótast, men stjórnin ætlar at bíða til næsta ár.